# Nú kemur lógin um arbeiðsumhvørvi

*Landsstýri hevur samtykt at leggja lógina um arbeiðsumhvørvi fyri tingið. Verður lógin samtykt, fær Arbeiðseftirlitið betri umstøður at fara eftir ólýdnum kommunalum og landsstovnum. Henda møguleika hevur stovnurin ikki í dag*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyrr í ár, skrivaðu vit um at almennar og privatar fyritøkur ikki vóru javnt settar, tá tað galt um at fylgja ásetingunum frá Arbeiðseftirlitinum.

Privatar fyritøkur, sum frá Arbeiðseftirlitinum fáa kravboð um broytingar, mugu gera eftir boðunum, annars kunnu tey væntað revsing. Tað nýtast almennar fyritøkur í somu støðu ikki at gera, tí Arbeiðseftirlitið hevur ikki lógarheimild at gera nakað við tað.

Men nú er broytingin áveg.

Gunnar Holm-Jacobsen, úr Vinnumálastýrinum sigur við Sosialin, at landsstýrið hevur avgjørt, at leggja lógaruppskotið um arbeiðsumhvørvi fyri tingið.

Í hesum lógaruppskotið er ein serskild heimild, sum gevur Arbeiðseftirlitinum rætt til at »fara eftir« almennum og kommunalum stovnum, fylgja teir ikki boðum teirra.

Hetta er triðja ferðin lógaruppskotið um arbeiðsumhvørvi verður lagt fyri tingið.

Tað var Arbeiðsumhvørvisráðið, sum landsstýrið setti í 1988, sum hevur gjørt lógaruppskotið. Tað hevur verið fyri í tinginum tvær ferðir fyrr, men er ongantíð komið longur.

Seinast fall tað burtur í sambandi við, at Edmund Joensen, táverandi løgmaður skrvaði út nýval.

Nú verður so roynt einaferð enn, og so er bara at vóna, at tað eydnast triðju ferð.

Gunnar Holm-Jacobsen sigur, at nakrar broytingar eru gjørdar í uppskotinum, men tær eru smáar.

# BLF viðger málið um búskaparráðið



Bergur Berg, formaður í BLF

*Felagið hjá búskaparfrøðingum og løgfrøðingum er ikki liðugt at viðgera útsøgnirnar hjá Jørgini Niclasen í sambandi við frágreiðingina hjá Búskaparráðnum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Nevndin í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum hevur tikið málið upp um búskaparráðið, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hølvaði av alment, men enn er viðgerðin ikki liðug.

Bergur Berg, formaður í BLF, sigur, at felagið hevur viðgjørt málið, men enn er ikki greitt hvussu tað skal gerast.

– Tað sum er farið er farið og tí halda vit, at tað er rættast at hyggja frameftir. Men vit vita ikki heilt hvussu tað skal gerast, sigur hann.

– Og tað er hetta vit royna at finna út av í løtuni. Men tað er stórur áhugi fyri málinum millum limirnar, so vit skulu finna fram til eina loysn á hesum málinum, sigur formaðurin.

# Dómurin roynast í landsrættinum




Mynd: Jan Müller

ÓLAVUR Í BEITI

Skiparin á norska frystilínubátinum »Urvaag« tók ikki við dóminum í Føroya Rætti, men hevur skotið hann inn fyri Landsrættin.

Eftir at hava tikið veiðina innaftur, fór »Urvaag« av Havnini aftur tíðliga í gjáramorgunin.

Tá hevði reiðaríið veitt trygd fyri bótini upp á eina góða millión.

Skipið var tikið fyri at hava ov stóra hjáveiðu - góð 45 prosent. Eftir gamla sáttmálanum millum Noreg og Føroyar var loyvda hjáveiðuprosentið 35, men eftir nýggja sáttmálanum er tað 30. Og tað er orsøkin til at tveir norskir skiparar hava kært dómarnar fyri landsrættin, tí nýggja hjáveiðuprosentið ikki er kunngjørt enn.



*Tíggju ár eru liðin síðani nýggi skúlin á Skála varð tikin í nýtslu og tað verður hildið við kvøldsetu*

# Hátíðarhalda tíggju ára dagin

*Mánadagin eru tíggju ár liðin síðani nýggi skúlin á Skála varð tikin í nýtslu og tað verður hátíðarhildið við kvøldsetu í skúlanum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Mánadagin 21. februar eru liðin tíggju ár, síðani nýggi skúlin á Skála varð tikin í nýtslu.

Í tí sambandi bjóða lærararnir og skúlanevndin í felag bygdafólkinum til eina kvøldsetu í skúlanum at hátíðarhalda dagin saman við teimum.

Dagurin 21. februar er á ein hátt vorðin skúladagur á Skála, tí gamli skúlin, sum varð burturbeindur, tá hesin varð tikin í nýtslu, var eisini vígdur 21. februar - í 1960.

**Sangur og leikir**

Kvøldsetan er sett saman við eini rúgvu av ymsum tiltøkum.

Kvøldið byrjar við, at Pauli Joensen, fyrrverandi fyrstilærari fer at siga nøkur orð.

– Pauli gjørdi eitt stórt arbeiði fyri at fáa nýggja skúlan, sigur Súni Kristiansen.

Annars vera allir næmingarnir aktivir á ein ella annan hátt, antin við sangi ella við leiki, sigur Súni Kristiansen.

– Fjórði flokkur ger kortini eitt sindur meira burturúr, tí tey skulu framføra ein leik um ein tann kendasta skálamannin gjøgnum tíðirnar, nevniliga Orm Bónda.

– Tey fara m. a. at tríva í eitt kvæði um Orm Bónda, sum Jørgin Thomsen, sum var løgtingsmaður, yrkti í sínari tíð. Tað eru ikki so nógv, sum kenna til kvæði, so teirra framførsla er eitt sindur serlig í so máta.

Seinni verður eisini lokalt skemt á skránni, sketchir og annað tílíkt.

**Nýggja heimasíðu**

Í fjør fekk Skála skúli, sum ein av teimum fyrstu skúlunum í landinum sína egnu heimasíðu á internetinum.

Síðuna gjørdu næmingarnir í 5. og 6. flokki saman við nøkrum lærarum, og síðani hevur Súni sjálvur staðið fyri viðlíkahaldinum av síðuni.

Av tí at síðan var gjørd í einum serligum forritið var viðlíkahaldið rættiliga trupult og tí hevur Súni gjørt síðuna av nýggjum í einum øðrum forriti, sum er nógv lættari at arbeiða við.

Henda nýggja síðan verður tikin í nýtslu mánadagin og Súni fer sjálvur at vísa kvøldsetugestunum hvussu hon er uppbygd.

**Netkafé**

Kvøldsetan í skúlanum á Skála byrjar klokkan 19.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin. Bæði næmingar, foreldur, gamlir næmingar og bygdafólkið annars, sigur Súni.

Hóast kvøldsetan byrjar klokkan 19, so verður skúlin kortini latin upp tveir tímar fyrr.

– Vit lata skúlan upp klokkan 17.00. So kunnu fólk koma at hyggja at skúlanum í frið og náðum áðrenn kvøldsetan byrjar sigur Súni.

Og hava tey so eisini hug at royna seg á internetinum, so er eisini møguleiki til tess.

– Skúlin er rættiliga væl fyri við teldum, og tað ætla vit at bygdafólkið skal havav fyrimun av mánakvøldið. So kunnu tey royna seg á netinum hava tey hug til tess, sigur Súni, sum vónar at nógv fólk koma í skúlan at hátíðarhalda dagin saman við teimum.



Nýtt ískoyti til skrokktryggingar

TRYGD Bilhjálp









Í morgin kann
tað verða títt tørn...

Vit kenna tað øll: Bilurin hevur mist streymin, hann er punkteraður, einki brennievni er eftir, ella hann vil ikki koyra meira, og vit sleppa ongan veg.

Er bilurin skrokktryggaður í Trygd, kanst tú fáa ókeypis hjálp við at tekna **Trygd Bilhjálp**.

**Trygd Bilhjálp** fevnir m.a. um útreiðslur til t.d. starthjálp, kranabil og mekaniska hjálp á staðnum í sambandi við óhapp, motorsteðg ella líknandi trupulleikar við bilinum.

Við **Trygd Bilhjálp** fært tú hjálp um alt landið og nærum um alt Europa.

Trygd samstarvar við Falck í Danmark, soleiðis at tú við **Trygd Bilhjáp** fær somu tænastur, sum viðskiftafólkini hjá Falck.

Er títt tørn komið til at verða óheppin, skalt tú bert ringja til Skaðatænastuna hjá Trygd ella til Falck, um tú ert uttanlands, og vit senda tær hjálp.

Við **Trygd Bilhjálp** fært tú hjálp alt samdøgrið, alt árið, um tú ert í Klaksvík ella í Palermo á Sicilien, uttan at tú skalt hugsa um rokningina.

**Trygd Bilhjálp,** ið er eitt ískoyti til skrokktryggingarnar hjá Trygd, kostar einans 350,- kr. um árið, tá ið bilurin er yngri enn 6 ár, og 450,- kr. um árið, er hann eldri.

Um tú ikki longu hevur tryggjað bil tín hjá Trygd, so eru nú enn fleiri orsøkir til at gera tað.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá tær **Trygd Bilhjálp** - tað fer at loysa seg.

*Vit selja ikki tryggingar, men trygd.*

TRYGD

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11

petur & petur · 320870